


Tøknifrágreiðing

# Teldutøk Fiskimið

Knud Simonsen & Mourits M. Joensen

NVD*Rit* 2003:04
NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Faculty of Science and Technology University of the Faroe Islands

| | |
|---|---|
| Heiti / Title | **Teldutøk Fiskimið** |
| | - ein verkætlan, sum partvíst er fíggjað av Fiskivinnuroyndir undir Fiskimálaráðnum. |
| Høvundar / Authors | **Knud Simonsen**<br>Náttúruvísindadeildin, Tórshavn<br>@: knuds@setur.fo<br>**Mourits M. Joensen**<br>Fiskirannsóknarstovan, Tórshavn. |
| Ritslag / Report Type | Tøknifrágreiðing / *Technical Report* |
| Latið inn / Submitted | Jan. 2003 |
| Rættingar/ Corrections | 11.02.2003 |

NVD*Rit* 2002:04
© Náttúruvísindadeildin og høvundarnir
Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn , Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. Box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
Tlf. · Fax · @ +298 352551 · +298 252551 · nvd@setur.fo

# Innihald

**1 Inngangur** **2**

**2 Savnan av fiskimiða kunning** **2**
2.1 Miðabøkur . . . . . . . . . . 4
2.2 Knáttstøður . . . . . . . . . . 6
2.3 Myndir . . . . . . . . . . 7

**3 Kunningarskipan** **8**

**4 Útgávuleistur** **9**

**5 Niðurstøða** **9**

**6 Tøkkir** **9**

**7 Skrásetingarblað** **11**

# 1 Inngangur

Vitan um fiskimið var fyrr avgerandi fyri teir, ið troyttu sjógvin. Henda vitanin hevur enn týdning, men er í alt størri mun avloyst av elektroniskum hentleikum. Ein avleiðing av hesum er, at vitanin um fiskimiðini spakuliga verður gloymd.

Fleiri miðabøkur eru útgivnar, og eisini hava útróðrarmenn skrivað nógv niður. Í eldri miðabókum verða miðini givin við ýtum á landi, ella eisini eru kort gjørd, har miðini er áteknaði. Útróðarmenn hava eisini fest GPS positión hjá miðum á blað, men neyvar positiónir við DGPS vórðu ikki møguligar fyrr enn í 1998. Tað nógva av vitanini er kortini ikki fest á blað, og nógv av tí, sum er skrivað niður, er ikki tøkt hjá almenninginum, og vandi er fyri, at tað hvørvur, tá heimildarfólkini fella frá.

Neyv botnkort verða nú framleidd á Náttúruvísindadeildini, og á teimum síggjast fleiri grynnir og kneysar, sum eru hugsandi fiskimið. Harumframt verður arbeitt við at gera teldutøk streymkort, sum eftir ætlan skulu kunnu brúkast í elektroniskari navtiskari útgerð. Endmálið aftanfyri hesari verkætlan var at varðveita ein part av gomlu útróðrarmentanina og at gera gamla útróðrarvitan tøka í nýggjari teldutøkni, sum er at finna í flestu førum á sjónum í dag.

Í hesari pilot-verkætlanini varð miðað eftir at savna tilfar um høvuðsmiðini í einum avmarkaðum økið, og brúka royndirnar til at menna mannagongdir til at fáa álítandi kunning um fiskimið teldutøka, leggja tilrættis eina kunningarskipan og ein útgávuleist av innkomnum tilfari. Hettar endamálið er rokkið, og er greitt frá hesum í hesari frágreiðingini.

# 2 Savnan av fiskimiða kunning

Eitt spurnarblað er evnað til, sum skal nýtast til at lýsa hvørt einstakt mið. Fyri hvørt mið verður ynskt at fáa at vita:

- Navn á frásøgumanni. Tað er ikki krav, at hettar verður fylt út, men er ætlað soleiðis, at tað verður kent, hvør miðamaðurin er.
- Heitið á miðinum
- Ýtir skrivaði niður og í tann mun, tað verður møguligt, eisini við digitalum myndum.
- GPS positión
- Besta árstíð at royna á miðinum
- Streymviðurskiftir, t.d. nær best er at royna
- Botnslag
- Egnaður reiðskapur

| Miðamaður | Heimstaður | Kelda | Tilfar |
|---|---|---|---|
| Edvin Arge | Argir | Sjálvur | Munnlig frásøgn og miðasavn |
| Jógvan á Argjaboða | Argir | Sjálvur | Munnlig frásøgn og miðasavn |
| Louis Højgaard | Tórshavn | Sjálvur | 2 miðasøvn |
| Kristian Jacobsen | Nólsoy | Esmar Jacobsen | Miðasavn |
| Karl Johan Hansen | Lamba | Hanna Elina Djurhus | Miðasavn |
| Frants Jacobsen | Gøtu | Ása Jacobsen | Miðasavn |
| Torkil Verner Hansen | Tórshavn | Winny í Pætursstovu | Miðasavn |
| Vigelund Hansen | Tórshavn | Winny í Pætursstovu og Dagblaðið, 1982 | Miðasavn |
| Jákup Pauli Joensen | Argir | Hans Paula Joensen | Miðasavn |
| Hanus E. Hanusarson | Nólsoy | Louis Højgaard | Miðasavn |
| Sylverius Øregaard | Leivík | Karl N. Hansen | Miðasavn |

Talva 1: Miðasøvn og annað tilfar, sum er savnað inn og sum partvíst er lagt inn í skrásetingarskipanina. Undir kelda eru tey nevnd, sum hava latið verkætlanini tilfarið. Harumframt hevur verkætlanin fingið annað tilfar, sum ikki er viðgjørt enn og sum ikki er nevnt her.

- Fiskaslag, sum er vanligt at fáa
- Viðmerkingar, m.a. um onkur søga knýtir seg at hesum miðinum.

Spurnarblaðið er viðgjørt saman við miðamonnum á fundi á Fiskirannsóknarstovuni og roynt á tveimum túrum við staðkendum monnum, og tykist at verða hóskandi. Upplýsingar um best árstíð, streymviðurskiftir, reiðskapur og møgulig søga, er torført at festa á blað úti á bátinum. Tá er ein fyrimunur at festa slíkar samrøður á band og síðani skrivað søgurnar av, tá komið er á land. Á túrunum, sum hava verið, eru upptøkur gjørdar við bandupptakara, sum varð læntur frá Ùtvarp Føroya. Ásannast má, at eftirarbeiði av hesum tilfarinum er sera arbeiðskrevjandi, og tí má heldur leggjast eftir, at hetta tilfarið verður lagt inn í skránna so hvørt orka til tess.

Eftir fyrispurningi og eisini av sínum eintøkum hevur verkætlanin fingið hópin av miðabókum. Avrit er tikið av hesum tilfarinum. Í talvu 1 er listi av nøvnum, har miðanavn, ýtir, og aðrir upplýsingar eru lagdir inn í eina dátuskipan, sum er ment í verkætlanini. Umframt tilfarið í talvu 1 hevur verkætlanin fingið fleiri enn 5 miðabøkur og dag- og log bøkur frá bátum, sum orka ikki hevur verið til at viðgjørt enn. Nøkur av miðunum hava verið vitjaði á túrunum, sum hava verið við báti, har knattstøða og myndir av ýtunum er tikið. Nærri er greitt frá hesum seinni.




| |
|---|
| *Raðhamrar.* |
| *1) Raðhamar uttantil.* |
| *2) Gøtunes í Borðoyarnes.* |

Mynd 1: Dømi úr miðabók, har miðini eru teknaði inn á kort. Hetta dømi er úr miðasavninum hjá Frants Jacobsen, sála, Norðagøtu.

## 2.1 Miðabøkur

Verkætlanin hevur fingið eintøk av fleiri miðabókum ella miðalistum. Nakrar av miðabókunum eru hondskrivaðu upprunabøkurnar, nakrar eru maskinskrivaðar og aðrar eru við kortum og átekningum. Í søvnunum eru nógv staðarnøvn, sum helst bert fá kenna til í dag, og okkurt áhugavert til føroysku málsøguna er eisini at finna. Dømir um miðasøvn er vísa á myndunum 1 og 2.

Miðanavn, ýtir og møguliga aðrir upplýsingar, sum eru knýttir at miðinum, eru lagdir inn í eina teldu skipan, og fyribils eru knapt 1000 mið løgd inn. Nøkur fá mið eru frá økjum uttan fyri høvuðsøkið, men eru tey minni enn 100 í tali. Nøkur mið ganga aftur í fleiri søvnum, men stundum eru ymisk ýtir ella ymisk nøvn á somu ýtum, og tí eru tey øll løgd inn í hesum fyrsta umfarinum. Ætlanin var, at eitt mið bert skal koma fyri einaferð, men komið er fram til, at summi mið verða skrásett meira enn eina ferð fyri, tí ymsir miðamenn hava sett ymisk ýtir til sama miði.

Á Bandasavninum á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrið Føroya eru fleiri upptøkur av frásagnum um mið og ýtir. Loyvi at nýta tilfarið er fingið frá Bandasavninum, men av tí at nógv av tilfarinum er latið inn í trúnaði, so má loyvi eisini fáast



10. Sigri Gjövur.
Longe Brekken noget lit indenfor Longegjöven! Kamben i den nordrere Höj, som er paa Krisstoffers Mið.
11. Edlis Mið.
Kamben norden til ved Tosdals Höj! den indere Kant paa Föstefadle net paa Longegjöven.
12. Kobba Stráti.
Kamben i Longevojlen! Kanten af Föstefadle bredder under holsöen udentil.
13. Sakarisa Skalli.
Den indere ende af Föste-fadle paa Longevojlen! Kamben i Stenbiden.
14. Skallin á Miðladals Mið.
Kamben i gjili! Föstefadle i den samme brekke som Longebrekken er paa Sigri Tinder.
15. Kobberin.
Kamben i Stenbiden! den sidste Berg under Skoren i Aadnefjord skal ligge om det halve Berg.
16. Stenbiden.
Kamben i Stenbiden! og det förste Bulskovene komme til syne
17. Johannesa Strát.
Longebrekken skal ligge inden til ved Longegjoven! noget sydfra Tosdalshöj er en Brekke deri skal Kamben ligge.

Mynd 2: Dømi úr hondskrivaða miðabók. Hetta dømi er úr miðabókini hjá Hanus E. Hanusarson, Nólsoy.

frá heimildarfólkunum ella, um tey ikki longur eru á lívi, frá teirra avvarandi.

Onki av miðasøvnunum, sum eru nevnd í talvu 1, eru givin út. Í talvu 2 er ein listi við miðasøvnum, sum eru givin út. Møguliga eru fleiri søvn, ið eru útgivin sum partar av øðrum bókum, sum verkætlanin ikki hevur kunnleika um. Eitt hugskot er at fáa tilfarið í hesum søvnum við í skipanina, men má loyvi til tess útvegast.

| Rithøvundur | Heiti á útgávu | Útgávuár | Útgevari |
|---|---|---|---|
| Hans Andrias Jacobsen | Rivjatromin og Rivið | 1995 | Egið forlag |
| Marius Joensen | Mið og Mentan | 1987 | Egið forlag |
| Jákup M. Magnussen og Páll J. Nólsøe | Mið, plinkar og ýtir | 1947 | Landnám |
| Hans Pauli Luid | Miðasavnið Hovsrivan | 1992 | Hans Pauli Luid |
| Otto Joensen | Søgusmettan | 1996 | Søgusmettan |
| Robert Joensen | Bøleiðin | 1974 | Robert Joensen |

Talva 2: Miðasøvn, sum eru útgivin og sum verkætlanin hevur kunnleika um.




Mynd 3: Kortið vísir miðir, har myndir eru tiknar av ýtunum. Ørvarnir á miðinum 'Hjallurin' vísa í hvønn rætning ýtini, sum eru á mynd 4, eru.

## 2.2 Knáttstøður

Knattstøðan er bert tøk á nøkrum fáum miðum, og er tá í flestu førum talan um knattstøður tiknar áðrenn GPS-urin varð tøkur, ella lisin frá sjókortið. Eldri navigatións útgerð var ikki so neyv sum GPS-urin, og broytingar av sjókortum gjøgnum tíðirnar (broytt datum) gera at óvissa kann verða tengd at hesum knattstøðunum. Fyri at sleppa undan miskiljingum um knattstøðuna, verða hesar knattstøðurnar lisnar inn í skipanina sum fyribils knattstøður.

Nýttu knattstøðurnar eru allar tiknar við GPS á túrum, ið eru gjørdir sum partur av verkætlanini, ella við at útróðrarmenn útgjørdir við GPS hava latið verkætlanina knattstøður, sum teir hava lagt inn á plottaraskipan sína. Út frá royndunum í verkætlanini verður hetta mannagongdin framyvir.

Umleið 20 knattstøður á miðum eru tiknar á túrunum í verkætlanini (sí mynd 3), umframt at fleiri knattstøður eru fingnar frá útróðrarmonnum. Samanborið við tey um 1000 miðini, sum longu eru í skipanini, so er niðurstøðan at eitt ávíst arbeiði er fyri framman fyri at fáa knattstøður til øll miðini. Ásannandi at flestu bátar hava GPS í dag, er ætlaða mannagongdin at handa útskrivtir av mið og ýtum til menn, sum eru kunnugir við økið, og fáa teir at taka knattstøðurnar á miðini. Hetta verður ætlandi gjørt gjøgnum bátafeløgini.




Mynd 4: Dømi uppá myndir av ýtum. Talan er um miðið nevnt Hjallurin (sí mynd 3, har ýti 1 er Hjallarbrekkan í Nesið, ella kirkjan í Skopun undan Nesinum (Kirkjubønes) og ýti 2 er kirkjan í Nólsoy undan Tjørnunesið. Miði er frá savninum hjá Jógvan á Argjaboða, Argir. Í grafiska markamótinum, sum lagt er upp til at gera, verður miðið og ýtini eisini víst á einum kortið.

## 2.3 Myndir

Upprunaliga varð miða eftir at fáa myndir av ýtunum til vega í tann mun tað er møguligt. Undir viðgerðini av innkomna tilfarinum varð skjótt ásannað, at tað er avgerandi neyðugt at fáa myndirnar við í skipanina, og er hetta av fleiri orsøkum:

- fleiri staðarnøvn fara í gloymskuna so hvørt heimildarmennirnir fella frá
- navnið á einum staði er ikki tað sama í øllum bygdum
- tá miðamenn hava funnið sær ýtir, so er ikki altíð, at teir hava kent nøvnini á staðnum, sum teir hava nýtt sum ýtir. Stundum hevur als einki navn verði. Í hesum førum hava teir gjørt síni egnu staðarnøvn.
- at varðveita hesi staðarnøvnini er neyðugt um eitt miðasavn við ýtum skal hava nakra meining. Harumframt er hettar ein mentunararvur, sum er um at fána burtur.

Á ymsum heimasíðum eru myndir, sum man á skerminum kann ferðast kring allan sjónarringin í. Hildið varð, at hesar myndirnar eru sera vælegnaðar til endmálið hjá verkætlanini. Samband varð tikið við fyritøku, sum ger slíkar myndir og ein roynd varð gjørd at taka slíkar myndir. Ein vansi við at brúka hesa tøkni er at tað er neyðugt at nýta serútgerð, sum krevur ávísan førleika, og at eftirarbeiði er lutfalsliga umfatandi og krevur servitan. Orsakað av stóra talið av miðum er henda ætlan tí slept fyribils.

Ístaðin er roynd gjørd við at nýta eitt 'vanligt' talgilda myndatól, sum ikki krevur nakra servitan. Myndir eru tiknar á túrunum saman við miðamonnum og eru lagdar beinleiðis inn á eina farteldu. Aftaná túrin eru myndirnar skrivaðar út á pappír, og saman við miðamonnunum eru ýtini merkt inn á myndirnar, og síðani eru frámerkini teknaði inn á talgildaðu myndirnar. Fyri fáa nøgtandi myndagóðsku er tó neyðugt við myndatólum, sum í rættuliga stóran mun eru før fyri at hála myndina nærri.

Slíkt myndatól er útvega og roynt við góðum úrsliti. Henda skipan tykist at verða so mikið einføld, at fleiri fólk kunnu verða við at fáa myndirnar til høldar. Fyribils eru myndir av ýtum til 20 miðir í skránni og eitt dømi er víst á mynd 4.

# 3 Kunningarskipan

Til at skipa innsavnaða tilfarið hevur Sp/f Atlantic Technology ment eina skrásetingar skipan, sum um internetið gevur møguleika at skráseta upplýsingarnar, sum biði verður um í skrásetingarblaðnum, sum fyrr er umtalað. At skrásetast kann um internetið merkir, at tað ikki er neyðugt at skrásetingin fer fram á ávísum stað. Møguleikin fyri at leggja skrásetingina út í bátafeløg kring landi er sostatt til staðar, men er ætlanin at bert fáir einstaklingar skulu fáa slík rættindir.

Sum áður nevnt eru gott 1000 mið og plinkar skrásett í skipanini higartil, men av teimum hava um 20 váttaða knattstøðu og myndir av ýtunum.

Lagt er upp til at skipanin skal nýtast bæði sum uppruna skrásetingar skipan, og til at veita almenninginum kunningina skjótast møguligt eftur at hon er fingin til vega. Skrásetingarnar fáa sett á seg eitt ræðisspjaldur:

- **virkið**, sum verður sett á mið har allir ynsktir upplýsningar eru fingnir til vega og verða tøkir á netinum.
- **partvíst virkið**, sum verður sett á mið har upplýsingar vanta, t.d. knattstøður vanta tí staðarnøvn og annað ikki eru kend. Tilfarið verður tøkt á netinum við vónini um at onkur brúkari kann veita kunningina, sum vantar.
- **óvirkið**, sum verður sett á mið, har einhvør orsøk ger at kunningin ikki kann leggjast alment út, men at tað kortini er mett at verða rætt at skráseta upplýsingarnar til arbeiðsbrúk.

Skipanin hevur møguleika at skipa tilfar í listar eftir miðanavnið ella miðamanni, og fyrireikingar eru gjørdar til at menna skipanina víðari, soleiðis at almenningurin fær atgongd til tilfarið um eitt grafisk markamót. Fundir hava verði við feløg, sum gera kort, har til ber at leita eftir nøvnum í einum lista, og síðani at fáa at síggja hvar hetta navnið kemur fyri á einum kortið, ella við at fara inn og biða um upplýsingar í einum økið, sum brúkarin teknar á telduskjermin. Tá funnið er fram til eitt stað, ella eitt navn, sum ein ynskir at kanna nærri, so kann biðast um allar upplýsningar. Kortini fevna um eitt yvirlitskort fyri allan ynnara landgrunnin, sum hevur nøkur høvuðsmið. Síðani ber til at hyggja nærri (zooma) inn á ávís økir, og so hvørt koma fleiri mið og staðarnøvn fram.

Í fyrireikingunum er eisini lagt upp til at skipanin kann brúkast til at skriva út miðabøkur. Við at brúka skipanina kunnu t.d. øll mið í einum økið, ella øll mið, sum ávísur maður hevur savnað, bólkast saman og setast út í kort, sum eisini lýsir botnviðurskiftini.

Farið er undir at útvega fígging til hesa víðari menning.

# 4 Útgávuleistur

Sum nevnt omanfyri verður høvuðsútgávustaðið um internetið, men harumframt er eisini ætlanin at geva miðasøvn út sum bøkur ella heftir.

Í innkomna tilfarinum eru miðasøvn, sum eru komin so mikið áleiðis, at lítið vantar í fyri at tey kunnu gevast út. Miða verður ímóti at hetta kann verða gjørt í fylgjandi verkætlan. Hetta er tó treytað av at skrásetingarskipanin kemur at virka soleiðis sum lagt er upp til, t.v.s. at neyðug fígging verður útvega.

# 5 Niðurstøða

Í hesari pilot-verkætlanini er savnað fleiri enn 17 miðasøvn, umframt annað tilfar. Ein partur av innsavnaða tilfarinum, gott 1000 mið frá 12 miðasøvnum, er lagt inn í eina skrásetingar skipan, sum er ment í verkætlanini. Fyri 20 av miðunum eru GPS knattstøður og talgildaðar myndir av ýtunum eisini fingnar til vega.

Mannagongdir til at skráseta miðini í telduskipan, fáa til vega GPS knattstøður og talgildaðar myndir av ýtum eru mentar og royndar. Um hóskandi skjótgangandi bátur framhaldandi verður tøkur og sama vælvild frá miðamonnum framhaldandi verður sýnd verkætlanini, so verður út frá royndunum frá pilot-verkætlanini mett at talgilda tilfar kann útvegast fyri meginpartin av skrásettu miðini, og verkætlanin kann víðkast til at fevna um onnur økir í Føroyum.

Menta teldu skráin gevur møguleikar til um internetið at skráseta miðini. Hettar merkir, at tað ikki er neyðugt at skrásetingin fer fram á ávísum staðið, men kann leggjast út kring landi. Skráin hevur møguleikar til at vísa innkomna tilfarið í listar skipaðir á ymsan hátt, men fyrireikingar eru gjørdar til at menna skránna víðari, soleiðis at almenningurin kann leita í tilfarinum um eitt grafiskt markamót.

Lagt er upp til at høvuðsútgávustaðið verður um internetið, men serstøk miðasøvn skulu eisini gevast út. Nøkur av innkomnu miðasøvnum eru komin so mikið langt ávegis, at lítið restur í til at tey kunnu gevast út. Lagt er upp til, at telduskipanin í stóran mun skal kunna gagnnýtast í útgávuvirkseminum.

Samanumtikið, so er málið um at savna tilfar um høvuðsmiðini í einum avmarkaðum økið væl og virðiliga rokkið, mannagongdir til at fáa álítandi kunning um fiskimið eru mentar og royndar, og kunningarskipan og útgávuleistur eru løgd til rættis.

Pilot-verkætlanin hevur víst at sera stórur áhuga er fyri at varðveita henda partin av gamla útróðrarkunnleikanum og at møguligt er at gera hetta tøkt fyri nýggja ættarliðinum við brúk av teldutøkni.

# 6 Tøkkir

Stóra tøkk til øll tey, sum á ein ella annan hátt hava stuðla verkætlanini við at koma á fundir, latið tilfar, víst á tilfar, givið góð ráð, ella stuðla á annan hátt.

Í tilvildarliga raðfylgju hava fylgjandi stuðla verkætlanini: Páll Klein, Tórshavn; Kartni Olsen, Tórshavn; Bjarni Skaalum, Argir; Klæmint Tausen, Tórshavn; Tórleif Joensen, Tórshavn; Jákup (á Sundi) Reinert, Tórshavn; Hákun Poulsen, Tórshavn; Jóhan Hendrik Winther Poulsen, Kirkjubø; Alvi Nilsen, Hoyvík; Yngve Guttesen, Tórshavn; Øssur Hjalt, Tórshavn; Ása Jacobsen, Norðagøtu; Louis Højgaard, Tórshavn; Winny í Pætursstovu, Tórshavn; Hanna Elina Djurhus, Kollafirði; Niklas Mikkelsen, Syðrugøta; Esmar Jacobsen, Nólsoy; Hans Pauli Joensen, Argir; Mortan Joensen, Argir; Karl N. Hansen, Tvøroyri; - og helst eru nøkur av misgávum ikki nevnd her, men eiga tey eisini eina stóra tøkk.

Serstaka tøkk til Magnus Magnussen fyri brúk av báti hansara, Sirius, og til Edvin Arge, Argir, og Jógvan á Argjaboða, Argir, sum hava verið við á fjørinum og lagt til miðis.

Henda pilot verkætlanin er partvíst fíggjað av Fiskivinnuroyndum undir Fiskimálastýrinum, við játtan eyðmerkt 16/2002.

# 7 Skrásetingarblað

| | | |
|---|---|---|
| **Bátanavn:** | **Sýslunr:** | **Dagfesting:** |
| **Navn:** | | **Føðiár:** |
| **Fyrrv./Núverandi starv:** | | |
| **Mið:** | | |
| **Ýti 1:** | | |
| **Ýti 2:** | | |
| **Ýti 3:** | | |
| **Fyribils knattstøða.:** **Longd:** ° , | **Breidd:** ° , | |
| **GPS knattstøða.:** **Longd:** ° , | **Breidd:** ° , | |
| **Besta rák:** | | |
| **Botnur:** | | |
| **Egnaður reiðskapur:** | | |
| **Fiskaslag:** | | |
| **Viðmerkingar:** | | |